

sozo

# Vælkomin á ársaðalfund

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag hevur ársaðalfund Kristi Himmalsferðardag – hósdagin 1. mai 2008 kl. 14.30 í Hoyvíkar kirkju.

**Fundarskrá**

1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir, mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar frammanundan aðalfundinum.

Í sambandi við aðalfundin, verður alment møti í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum kl. 19.

*KRISTILIGT LURTARA OG HYGGJARAFELAG*

Mørkin 10 · 530 Fuglafjørður · tel 44 40 13
klh@klh.fo · www.klh.fo

Kristiligt Lurtara & Hyggjarafelag er einasta skipaða lurtara- og hyggjarafelag í Føroyum. Endamál felagsins er at virka fyri kristiligum sendingum í almennu fjølmiðlunum í útvarpi og sjónvarpi t.d. gudstænastum, kristiligum fundum, andaktum, kristiligum sangi og tónleiki, tíðindum frá kristiligum arbeiði o.t.

KLH stýðjar útvarp og sjónvarp í góðum og sømiligum sendingum. KLH arbeiðir ímóti at útvarp og sjónvarp verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, ið er ikki kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag er limafelagsskapur við umleið 1400 limum. So tekna teg sum lim í KLH og ver soleiðis uppií arbeiðinum fyri góðum tilfari í útvarpi og sjónvarpi.





## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

## Tofta skúli søkir eftir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Tíðarskeiðið verður frá 6. mai til 27. juni 2008

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær:**

- flokkslærarauppgávu
- føroyskt, søgu, sang, heimkunnleika í 5. flokki
- stuðul í flokkum

**Vit vænta, at tú:**

- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 23. apríl kl. 12.00**

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur 193 næmingar í 1. – 10.fl. og 25 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/

## Ekspetrisa / ekspedientur

**Vit sóknast eftir ekspetrisu/ekspedienti, sum feriuavloysara at byrja 13. mai.**

**Arbeiðið er sjálvstøðugt. Ein, ið hevur arbeitt í klædnahandli áður, hevur góðan fyrimun.**

**Løn (góð) sambært avtalu.**

Hans Joensen
Síðan 1889

**á Hálsi · tlf. 21 72 10**

## Tryggur og bíligur




**STUBBIN** Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo

## Stoypa grund?

**Manglar tær at fáa grundina stoypta, garðin ella hjallin, eru vit tey tú manglar.**

**Ring og fá eitt óbindandi tilboð.**

**Vit gera alt stoypiarbeiði – stórt sum smátt.**

**J.J. Betong**

**Tlf. 21 20 90 ella 44 78 90**

**Viðgerðarstovan Frídd til sølu**
**www.fridd.fo**

**Ring og hoyr nærri**
**tlf 310560**

Frídd

Sosialurin
www.sosialurin.fo